

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 15 - 03 - 2013

# Atlantic Petroleum besta úrslitið nakrantíð

2012 gjørdist besta árið nakrantíð hjá Atlantic Petroleum. Úrslitið av primerum rakstri (EBIT) gjørdist 246,8 mió. kr., ið var nærum tað tvífalda av úrslitinum í 2011, ið var 126,3 mió. kr. Vinningurin frá olju- og gassframleiðsluni varð 596,7 mió.kr., ið er tað mesta felagið hevur havt (í 2011 var hann 434,8 mió. kr.). Úrslitið áðrenn skatt í 2012 varð 227,7 mió. kr. (í 2011 var tað 127,5 mió. kr.). Úrslitið eftir skatt varð 66,7 mió. kr. (í 2011 var tað 66,6 mió. kr.). Samlaða framleiðslan úr Chestnut, Ettrick og Blackbird varð 928.000 tunnur (boe). Miðaloljuprísurin var 112,3 USD per tunnuna. Gjaldførisúrslit frá primerum rakstri varð 367,6 mió. kr. (í 2011 varð tað 269,9 mió. kr.). Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum sigur - Nú síggja vit úrslitið av tí vakstrarætlan, ið Atlantic Petroleum setti út í kortið í 2010. Ætlanin savnar seg um at økja um framleiðsluna og inntøkuna uppá styttri sigt, ímeðan hon uppá longri sigt miðar ímóti at felagið kemur inn í leiting, ið kann vaksa munandi um felagið. Vit hava tvífalda okkara oljugoymslur og tilfeingi, og við ætlaðu framleiðsluni úr Orlando og Kells kunnu vit síggja fram til eina økta framleiðslu komandi árini.